TING-HELLAN

Løgmaður í tíðarneyð

Løglistin var hjálagdur løgmansrøðuni á ólavsøku. Listin vísir, at trupult er at umseta samgonguskjalið til lógaruppskot, og illa gongst at fáa uppskotini framløgd

TINGHELLUANALYSAN
Kári á Rógvi
kar@faroe-law.fo

Løglistin er heftur at løgmansrøðuni á hvørjum ári

Jóannes Eidesgaard gjørdist løgmaður í søguligari samgongu. Breiðar samgongur eru sjáldsamar í Føroyum, og ABC-samgongan er ikki roynd áður. Tað var longu greitt til valið í 2002, at kemiin í fullveldissamgonguni var ikki longur tann rætta, meðan ABC blandingin tyktist kunna gerast tann mest stabila. Hóast løgurin týðiliga var farin at prutla, helt fullveldissinnaða samgongan frá 1998 tó fram, kókaði yvir í 2004, og valið í vár gav okkum ta núverandi samgonguna. Eftir stendur bert eitt: er verandi samgonga vald, bert tí blandingin er tung og stabil, ella hevur ABC'ið sett sær verulig politisk mál?

Løgmansrøðan kann geva okkum ábending um svarið. Fyrsta røðan hjá Jóannes løgmanni var heldur stutt. Men, stuttar rður kunnu vera góðar; heldur smáar rður, ið taka samanum stórar hugsjónir enn øvugt. Við rðu síni gjørdi løgmaður greitt, at hann vil hava "eitt gott land fyri okkum øll," at tað inniber "felags vón um einar góðar Føroyar" og "at útbyggja vælferðarsamfelagið." Hetta krevur bæði "at vinnan við nýhugsan og áræði stoðugt megnar at bera hesar útbyggingar," at fremja "týðandi samanleggingar í almennu fyrisitingini," at "landið fríger kapitalin, sum er bundin í Føroya Tele, Atlantsflog og Føroya Banka," og "at sjálvstýrismálið skal gerast søk fyri ta breiðu fjøldina."

Orðini sjálvi vissa okkum ikki um, hvat henda samgongan fer at avrika, orð siga altíð minni enn avrik. Vilja vit vita, hvat hesin løgmaður veruliga hevur uppá seg, mugu vit hyggja at løglistanum, teimum gerðum, sum komnar eru í eyga.

Løglistin er heftur at løgmansrøðuni á hvørjum ári, ein listi við teimum lógum og tiltøkum, sum samgongan hevur sett sær fyri at fremja komandi tingárið. Løglistin er so at siga samgongugrundlag, ella ein skjalið, sum samgongan ger sína ætlan um at fremja. Tí er hetta eitt skjalið, sum vit ella almenningur kunnu nýta okkum til at meta um, hvat samgongan ætlar at fremja, og hvat hon ikki ætlar at fremja.

Skjalið umsett til fyrisitingarmál. Viðhvørt er umsetingin í so fyrisitingarlig, sum tá "fólk" verða kallaði "likamligir persónar" (tvassugt juridiskt hugtak) ella týðandi ætlanir verða nevndar "meginreglulig," (prinsippiellar) - men lat tað fara.

Knappliga 70 lógaruppskot verða fráboðaði í løglistanum, harav bert einstøk higartil eru løgd fram. Tað er framvegis ein ósiður, at lógaruppskot koma ov seint á tingborð - tey flestu av hesum uppskotum fara at koma fram antin beint fyri árslok ella beint áðrenn tingið fer í summarfrí. Henda samgongan átti at sett sær sum mál at lagt uppskotini fram fyrr, so tingið og serliga almenningurin fáa viðgjørt uppskotini nágreiniliga og í góðari tíð.

Sjeyti uppskot - 70 lógir - ljóða av nógvum, men nærri greitt, so eru gott tíggju teirra antin uppskot neyðug vegna altjóða krøv ella dagføringar av ríkislógum, og eini fjøruti antin uppskot arvaði frá undanfarnu samgongu ella á annan hátt tekniskt ella fyrisitingarkend mál.

Flestu uppskot, bæði eftir tali og veruligum nýskipaðum politikki, eigur almanna- og heilsumálaráði. Tann altið hugaði og ágrýtni Hans Pauli Strøm fer at leggja hesi uppskot fram. Mentamálaráðið og innlendismálaráðið við teimum báðum Jógvan á Lakjuni og á Keldu eiga saman við Hans Paula góða helvt av øllum teimum ætlaðu uppskotunum.

Hyggja vit at teimum punktum, sum vit nertu við í áðni, so eru heilt nógv uppskot klár, ið skulu "útbyggja vælferðarsamfelagið," meðan knapt so nógv sæst til vinnuliga nýhugsan og fríger av landsins kapitali, og minni til betringar og týðandi samanleggingar av almenna sektorinum.

Tríva vit í samanleggingar, so er ein slík fráboðað, sum er rættiliga áhugaverd. Sjómansskúlin og maskinmeistaraskúlin fara at leggja saman. Men samanleggninin tykist vera hend meira vegna tveir skúlastjórar, ið báðir ætlaðu sær frá, enn vegna nakra politiska ella fyrisitingarliga greiðning av almenna sektorinum. Bara tað, at eitt land við 48.000 íbúgvum hevur eitt ótal av hægri skúlum eigur at fáa okkum at hugsa. Hví hava vit bæði fróðskaparsetur, sjúkrasystraskúla, sjómansskúla og maskinmeistaraskúla, læraraskúla og pedagogskúla, heilsuskúla, handilsskúla umframt aðrar hægri skúlar? Svarið er einfalt: tað hava tey í Danmark og - sum eg sjálvur veit av royndum - tað, sum frøðingar læra á donskum skúlum, er at eftirgera danskar skipanir.

Sjálvt ikki tann sjálvbodna samanleggingin av sjómans- og maskinmeistaraskúlunum fekk fram nakað alment ella fakligt orðaskifti um fyrimunir og vansar við at samskipa alla hægri útbúgving í Føroyum. Hvørki figgjarmálaráð ella figgjarnevnd hava víst tekin um, at tey duga at síggja antin bygnaðarligar sparingar ella at vit kunnu fáa meira fyri somu pengar við slíkum samanleggingum.

Fyrsti listin

Tann fyrsti løglistin er oftanst tann mest týðandi. Fyrsti løglistin er tann, sum mest sannlíkt verður gjøgnumførdur, og tann, ið fær longstu tíðina at virka. Summar loysnir vilja altið vera sera ópopulerar Í seinastu samgongu sóu vit, hvussu torført tað var at fáa samgonguna at leggja skatt á grønar keks og taka av stuðulin til "konupengar" (stuðul til menn og kvinnur, ið hava skyldu partvíst at forsyrgja fyrrverandi hjúnafelagar og børn, ið búgva hjá hinum foreldrinum). Henda samgongan kann koma í somu støðu, at skulu leggja øktan skatt á okkurt ella - meiri sannlíkt - at taka av frádráttir ella studningar.

Tey, ið missa slíkar fyrimunir, merkja tað sera meint. Afturfyri leggur tann stóra fjøldin ikki eins nógv merki til, at sersømdir hjá teimum fáu verða avtiknar. Tað, sum verður framt tíðliga í valskeiðnum, verður partvíst gloymt; og partvíst hevur tað víst seg at rigga, sjálvt um summi hildu tað ikki fór at gera tað. Eisini hava fólk sissað seg og hugsað um "tað stóra bílætið" heldur enn bert um sín egna frádrátt ella studning.

Skulu umskipanir fremjast, krevur tað samstarv, samanhald og serstakliga alment samskifti og nøktandi frágreiðingar fyri øll. Sannlíkt er eisini, at nýskipanir og umskipanir skulu fremjast tíðliga í valskeiðnum.

Skattalættin og frígerðin

Tann hemmiligi skattalættin hjá sambandsflokkinum, sum kostaði flokkinum valsigurin, er nú vorðin hold og fer helst at verða samtyktur. Stóri teoretiski spurningurin er, hvat gera fólk, tá skattatrýstið linkar? Fara tey fyrr heim, tí tey tjena tað sama uppá styttri tíð, ella verða tey longur til arbeiðis, tí tey nú sleppa at behalda størri part av lønini? Helst er sannleikin onkustaðni harímillum, í øllum førum fáa frøðingarnir nú nøkur ár at kanna, hvat hendur, tá inntøkuskattatrýstið minkar, veksur búskapurin, hækkar innflutningurin og hvønn veg vendur nú Laffer-kurvan?

Sum tann seinasti av sosialdemokratisku leiðarunum í Norðanlondum hevur nú eisini Eidesgaard viðgingið, at almennar fyritøkur og almennur ognarlutur bindur pengar á óhepnan hátt. Landið eigur Føroya Banka, men tað hevði loyst seg betur, um landið í staðin rindaði aftur lán síni ella bygdi ellisheim ella skúlar fyri hesar pengarnar - og avmarkaði seg til at skatta bankan.

Eitt annað, sum má frígerast, er tíðin hjá løgmanni og landsstýrismonnum. Freistingin hjá teimum er at gerast "amtsborgmeistarar," ið ganga til hvørt einasta tiltak og hvørja einastu samkomu og halda røðu uppiyvir øllum avrikum og avdúkingum, stórum sum smáum, og halda fund við allar áhugabólkar og borgarar, sum ringja og gremja seg.

Samanumtikið

Henda samgongan kann enn avrika at gera landið betri fyri fleiri og sameina føroyingar. Tað ber til at brúka øll tey teknisku ella arvaðu uppskotini til miðvísar betringar. Hetta krevur, at landsstýris- og tingfólk kýta seg at laga tey fyrireikaðu uppskotini til samgonguskjalið og til aðrar broytingar og betringar, sum semja kann fáast um.

Tíverri er skipanin hjá okkum soleiðis, at trupult er hjá andstøðuni at fyrireika seg og hava lógaruppskot klár, tá hon endiliga kemur framat. Javnaðarflokkurin fyrireikaði okkurt uppskot í farna valskeiði, men ov trupult var at hava ein heilan løglista til reiðar.

Rættari og betri var, at løgtingsskrivstovan eins og fyrisitingarstovnar høvdu skyldu at hjálpt andstøðuni við lógaruppskotum, tí so høvdu bæði javnaðar- og sambandsflokkurin kunnað roynt uppskot síni longu í farna valskeiði, kunnað fingið viðmerkingar og viðgerð av teimum, og so lagt tey fram nú, meiri fullfíggjaði og fyrireikaði.

Skipanin hjá okkum ger, at politisku hugskotini nýstani nú skulu umsetast til fyrisitingarligar arbeiðsbólkar, og tey gerast ikki lógaruppskot fyrr annað ella triðja tingárið hjá samgonguni - og tá kann tað vera ov seint.

Tað mest spennandi í ólavsøkurøðu, frágreiðing og løglista, var helst lyftið frá løgmanni um at samskipa arbeiðið at gera politikk til lóg. Megnar løgmaður at økja ferðina í tilgongdini frá politikki til lóg uttan at verra viðgerðina og almenna orðaskiftið, so kann henda samgonga veruliga megna at gera landið betri fyri øll.

TING-HELLAN

Eitt fyrisitingarligt ódnartak

Arbeiðið at gera nýggja forsorgarlóg er so umfatandi, at endaliga úrslitið verður ikki klárt fyrr enn í 2007

LØGLISTI
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo

Tað krevur so sanniliga sítt - eisini góða konditión og heilsu - at smíða nýggja forsorgarlóg. Sitandi landsstýri má halda innanborðað alt valskeiðið, um hon smalað skal síkggja lógina gerast veruleiki

Mynd Jens K. Vang

Størsta og helst mest umfatandi lógararbeiðið hjá sitandi landsstýri komandi árini liggur hjá Almanna- og heilsumálaráðnum. Og størsti bitin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er ein nýggj forsorgarlóg. Hon er so umfatandi, at alt arbeiðið eftir ætlan ikki verður liðugt fyrr enn síðst í 2007. Tað vil siga, at verandi samgonga má halda út alt valskeiðið, um hon samlað skal síggja lógina gerast veruleiki.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur sett øll segl til fyri at røkka málinum um eina nýggja forsorgarlóg. Hann vísir á, at týdningurin av lógini er risastórur.

– Neyvan nøkur onnur lóg hevur so stóra beinleiðis á ávirkan á fólk sum hendan, sigur Hans Pauli Strøm.

Gomul donsk

Verandi forsorgarlóg fær somu orð við á vegnum sum so nógvar aðrar lógir, sum skulu eftirkannast ella gerast heilt av nýggjum: Hon er bæði gomul og donsk.

– Seinastu tretivu árini er hon rættað eitt sindur til og okkurt lagt afturat. Vit skulu vera glað fyri, at tað er ein forsorgarlóg, men samlað er hon óhóskandi og ikki løtt at arbeiða við, sigur Hans Pauli Strøm.

Eitt, sum tosað verður nógv um við nýggju lógini, er at gera alt forsorgarøkið greiðari, soleiðis at tað fer at virka betri fyri tann einstaka og fyri skipanina.

– Tað verður nýtt ov nógv orka til at meta um tann einstaka í hvørjum føri. Tað er serliga strævið fyri fólkini sjálvi, men skipanin tænir ongum sum best sum er, sigur Hans Pauli Strøm.

Arbeiðið er so drúgt, at tað ber ikki til hjá landsstýrismanninum í skrivandi stund at siga so nógv, hvørjar ítøkiligar broytingar ella ágóðar ávísir bólkar kunnu vænta sær, at vit fara at síggja í nýggju lógini.

Ein samfelagsbólkur, sum hevur verið nógv frammi seinastu tíðina, eru einligar mammur. Har hevur ein kanning víst, at tær hava ofta stórar trupulleikar at fáa endarnar at røkka saman. Landsstýrismaðurin lovar, at nýggja forsorgarlógin fer at koma væl við hjá hesum samfelagsbólki, har tað millum annað skal gerast greiðari, hvørji rættindi einligu mammunar hava og hvørjar ítøkiligar skyldur tað almenna hevur mótvegis teimum.

Í stigum

Hvat inniber so ein forsorgarlóg? Hví er tað so drúgt at fáa arbeiðið frá hondini?

Lógin umfatar fleiri samfelagsbólkar. Høvuðsbólkarnir eru børn við skerdum førleika, vaksin við skerdum førleika og fólk annars, sum av sosialum ella øðrum áðum hava brúk fyri forsorgarhjálp fyri at koma fyri seg aftur. Hesin triði bólkurin umfatar nógvar ymsar støður, fólk kunnu koma í.

Hetta eru alt stórir og umfatandi samfelagsbólkar, sum tað tekur drúgva tíð at viðgera hvør sær í. Greiðast skal fáast hvørji ítøkilig rættindi og skyldur eru galdandi. Hugsa vit bert um fólk við skerdum førleika, so umfatar lógin alt frá hjálpartólum og heilivág til tænastur av ymsum slag.

Á Almanna- og heilsumálaráðnum situr ein persónur burturav og arbeiðir fyri forsorgarlógini. Arbeiðið er harumframt skipað í arbeiðsbólkar, sum hava tilvísingarbólkar at vísa til og ráðfóra seg við. Til-vísingarbólkarnir hava umboð bæði úr ymsum áhugafeløgum, heilsuverki og aðrastaðni.

– Vit nýta fólk úr Almanna- og heilsumálaráðnum og taka eisini fólk inn útifrá við servitan. Hugskotið við tilvísingarbólkunum er at fáa so breiða umboðan og so nógva vitan við í kjakið í sambandi við lógarsmíðið sum gjørligt, sigur Hans Pauli Strøm.

Ein arbeiðsætlan í fleiri stigum er gjørd. Eftir henni skal eitt upplegg fyri børn við skerdum førleika verða liðugt í heyst. Komandi summar skuldi eitt útspæl um vaksin við skerdum førleika verið liðugt. Somuleiðis í 2005 verður roynt at gera uppleggið til restina av forsorgarlógini liðugt. 2006 skal nýtast til at finna eina heild í arbeiðinum. Ein drúgv hoyrifreist verður ásett, og arbeitt verður mett at gerast liðugt síðst í 2007.

Tað verður tosað um at leggja onkran part forsorgarlógini fram fyri seg, men í skrivandi stund verður arbeitt útfrá at gera eina umfatandi nýggja forsorgarlóg.

Funnu breiða semju

Nýggj lóg um barnavernd er í nánd, og hon leggur størri ábyrgd á kommunurnar og fakligu servitanina. Eisini eitt íløgusavn er ávegis

LØGLISTI
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo

Seinnu árini hevur drúgt stríð verið um skipanina av barnaverndum. Verandi lóg er ikki hóskandi, og nú hevur tað eydnast at finna eina loysn, ið bæði samgongan, kommunurnar og serkunnleikin kunnu taka undir við. Allir partar hava verið við í fyrireikandi arbeiðinum.

Barnavernd

Barnaverndirnar verða í framtíðini skipaðar í kommunalum eindum við fleiri enn 1.500 fólkum. Røkkur fólkatalið hjá einari kommunu ikki til, so skulu kommunurnar samstarva sína millum. Afturat barnaverndarnevndunum verður eisini ein barnaverdnarumsiting, sum skal gera alt fyrireikingararbeiði og allar kanningar fyri sjálva barnaverndina. Tað verða sett krøv til fakligan førleika í barnaverndarumsitingini.

– Tann fakligi førleikin fær nógv størri týdning enn áður. Men vit varðveita framvegis lokalu vitanina í barnaverndunum, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað verða kommunurnar sjálvar, sum skulu rinda fyri og standa fyri tí parti av økinum, ið snýr seg um fyribyrging. Landið skal taka sær tvangsskipanum, og har verður eisini skipað ein landsbarnaverndarnevnd við millum øðrum løgfrøðingi og sálarfrøðingi.

Ein barnaverndarstova skal samskipa alt økið og vera dyggur stuðul hjá barnaverndunum kring landið.

Landið fer at spara einar 13 milliónir við hesari nýggju skipanini. Samanlagt er skipanin vorðin 2,5 milliónir dýrari, og tað merkir, at kommunarnar skulu rinda næstan sekstan milliónir meira.

– Hetta verður regulerað við at kommunurnar fáa størri skattainntøku og parturin hjá landinum minkar tilsvarandi, sigur Hans Pauli Strøm.

Arvagransking

Ein nýggj lóg um arvagransking skal leggjast fyri løgtingið í oktober. Við lógini verður millum annað eitt íløgusavn sett á stovn. Savnið skal umfata ein biobanka, diagnosuskrá og ættarbandsskrá. Hesin stovnurin fær rætt at geva loyvi til at granska í føroyskum "genum" og krevja gjald fyri. Stovnurin skal vera sjálvfíggjandi, og mett verður, at tað er ein hampiligur møguleiki fyri, at tað eisini vil geva inntøkur til landskassan. Vísindasiðsemisnevndin og Dátaeftirlitið hava framvegis fult eftirlit við økinum. Somuleiðis eru ætlanir um at gera eina granskarapark, har føroyskir granskarar kunnu nýta gott av royndunum hjá hvørjum øðrum og hava eitt felags forum.